TELDUSÍÐAN

Heimskvæði á Netinum

Skrúva inn á bestu afrikansku rásirnar ella gamlar amerikanskar top-40 sendingar. Alt er møguligt á Internetinum

TEKSTMASKINAN

Internetið flytir mørk. Einu løtuna eru vit í Afrika og hoyra Township pop og staðilig tíðindi á Radio Metro, løtu seinni er vit førd 30 ár aftur í tíðina, aftur til Radio KFWB og ein morgunvert, ið fær Jógvan Arge at ljóða sum eina morgunbøn. Til ber at fáa nógvan tónleik á Internetinum, og tvær tær mest spennandi støðirnar, vit hava funnið, eru Qradio úr Suðurafrika og Reel Radio í USA.

Heimskvæði

Qradio finst á adressuni www.qradio.net. Her snýr tað seg um suðurafrikanskan tónleik, mentan og tíðindi. Vit kunnu klikkja okkum beinleiðis inn á fýra suðurafrikanskar radiostøðir og lurta á teimum rásum, ið tey hoyra har niðri – samstundis. Áhugavert!

Har er SAfm við tíðindum og talkshows, staðligum tónleiki og røddum frá Radio Zulu, og nýmótans hip hop og jassur á Metro og 5fm. Og mitt í øllum sjálvandi Back Street Boys og Spice Girls. Finasta slag.

Qradio – Quincy Jones World Music Experience er eisini eitt upplivilsi. Har eru eisini samrøður og kjaksendingar, sum til ber at logga seg inn á, um ein hevur hug at tosa við suðurafrikanarar, ið eru á netinum júst tá. Har eru discografiir yvir eina rød av afrikanskum tónleikarum og spennandi gjøgnumgongd av afrikanskum jassi og nýggjasta tónleikapalli í landinum. Hvør hevur til dømis hoyrt um tónleikastílir sum Bublegum og Crossovers?

Alt er kryddrað við hópinum av stuttum ljóðklippum. Qradio er veruliga eitt site, ið ger heimin minni, og fólk munandi glaðari.

Coca Cola is it

Og nú til nakað heilt annað, men minst líka stuttligt. Streymandi og brølandi amerikanskur radiotónleikur frá fyrst í 60'unum fram til síðst í 80'unum. WLS, KQB, WABS, KDWB – les hart við einum heitum epli í munninum, og tú veit, hvat vit tosa um.

Reel Radio er ein hugtakandi samling av gomlum amerikanskum sendingum við top-40 tónleiki, tíðindum, veðurvánum, jinglum, lýsingum, lýsingum. Hundraðtals klipp, nøkur bert fáar minuttir, onnur útvið ein tíma long. Øll hava tekst sum greiðir frá, hvaðani klippið stavar, og hvat er áhugavert við tí. Ljóðið er frálíkt og minnir mest um ljóðið frá einum transistorradio frá teirri tíðini.

Skrúva inn á www.reelradio.com og take a coca-cola. Tað er eitt mentanarsøguligt upplivilsi, og tað er ikki keðiligt.



Reel Radio er eitt arkiv av vældámdum amerikanskum radiosendingum frá byrjanini av 60-árunum til endan av 80-áunum



Um Real Audio er beinleiðis atgongd til fýra suðurafrikanskar rásir á Qradio

Teldunýtt

Kappingarbeyti til Windows 98?

Tað snýr seg um operativskipanina Be. Tað byrjaði sum ein sera framkomin operativskipan til Macintosh, men fæst nú eisini til Pentiumteldur. Be er nógv betri enn Windows 95 til multitasking, og harvið eisini til grafiskar uppgávur og spøl.

Fyritøkan Be hevur fyri stuttum fingið 150 mió í kapitalinnspræning, so onkur trýr upp á hugskotið. Til ber at kunna seg meiri um Be á heimasíðu teirra, www.be.com, har eisini ber til at downloada operativskipanina.

BMP DATA

ein av størstu leverandørum av PC-spølum í Danmark

TOP 10

1. StarCraft
2. Dark Omen
3. Bridge Deluxe II
4. MI Tankplatoon 2
5. Die by the Sword
6. Powerboat Racing
7. Hugo: Den fortryllede eg
8. Deadlock 2: Shrine Wars
9. Grand Theft Auto
10. Ultima Collection

Spølini kunnu fáast hjá TelduTænastuni

Packard Bell

- Intel Pentium MMX 233MHz ATX
- 32Mb SD RAM
- 4.3Gb harðdisk
- 15" litskermur v/ háttalarum / subwoofer / mikrofon
- 3D skermkort v/ 2Mb RAM
- 24x CD-ROM / 3D Ljóðkort
- 55.6 faxmodem tlf./ tlf. svarari
- FM Radio móttakara
- Ergonomiskt knappaborð
- Pulsar 3-knappa mús



MEIRA ENN 40 PROGRAMMIR!
m.a. : Win 95, Word 97, Works 4, Navigator 3.9, VirusScan, Family Tree, Encarta 97, MDK, SWIV 3D, Fifa 97, Picture Postcard, Floor Plan 3D, Picture Easy, Easy Language, Carnival Countdown.

20.950,-

TT SPF Teldu Tænastan
Staravegur 5 • Postsmoga 1144 • 110 Tórshavn • Tlf. 17620 • Fax 17699

LEXMARK 1000
NÝTT!
Prentarin til alt húskið...
- Við prentarakaðal
- Við litpatrón
- Snøgt prent bæði s/h og litir

600 x 600 DPI

Blaðið Datatid skrivar: "Kvaliteten absolut i top!"

1.690,- Vmvg

Opið er:
Mánadag-fríggjadag: 9.00-17.30
leygardag: 11.00-14.00

FX micro

FX-micro
Stiðjagøta 5
100 Tórshavn
Tlf. 111 15
– tín teldubandil